Keyp atgongumerki í forsølu áðrenn mikudagin 25. juli og spar 100,-

ÓLAVSØKUKONSERTIN
27. juli 2012 kl. 19.30-04.00
í Tórsgøtu

Sveinur Páll Finnur Páll
Eyðun & Terji Band McHár 200
Swangah Dangah Uni Debess Glóð
Grandma's Basement Gipsy Train The Colour Storm

Atgongumerki: Í forsølu kr. 200,-. (Við dyrnar 300,-)
Atgongumerki fáast á ebillett.fo og í Kunningarstovuni í Havn

Föroya Bjór
TIR.FO
TÓRSHAVNAR ÍTRÓTTARRÁÐ

Kári við nýggjum litum

Kári Svensson læt í gjár upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík

Randi Jacobsen

Tað er ein heldur øðrvísi framsýning, sum Kári Svensson nú hevur í Smiðjuni í Lítluvík.

Hann nevndir framsýningina "Djúpt í mínum huga".

- Eg sipi til, at eg havi tikið fram ymist, sum leingi hevur ligið í bakhøvdinum. Tað eru øðrvísi litsamansetingar, enn eg áður havi brúkt, striku, litspæl, og eg lati myrkur og ljós møtast, sigur Kári Svensson.

Teir umleið 20 málningarnir, hann hevur á framsýningini, eru tí nýggir.

Fyri fýra vikum síðan var Kári Svensson í Danmark, har hann í fýra vikur var saman við listafólkum úr fleiri ymiskum londum.

- Tað gav mær nógvan í blástur, hetta at vera so leingi burturav millum listafólk og ikki hugsa um annað enn list, sigur Kári Svensson.

Sjálvt um listin broytist, trýr hann ikki uppá, at landlagsmyndir eru søga. Tað er bara ein spurningur, hvussu tær verða formaðar.

Kári Svensson heldur tað vera sera týdningarmikið, at listafólk ikki standa í stað.

- Eg upplivi tað, sum um eg eri á veg. Í míni verð er tað burturvið at siga, at listafólk hava funnið seg sjálv. Vit mugu altíð víðari, sigur Kári Svensson.

Framsýning hansara er opin hvønn dag fram til týsdagin frá klokkan 14 til 18.



Nalja fer aftur á pall

Fyri fyrstu ferð í 22 ár standa tey bæði, Elin & Kári, sum góvu út NALJA-bandið í 1988, nú aftur saman á palli í samband við Heiðrið ymiskleikan/Gay Pride tiltakið fríggjadagin. Aftrat sær hava tey navnframu tónleikararnar í Plúmm og onnur. Umframt Elina & Kára verða eisini Eivør, 200, Mike, Ævintýraferðin við Búa og Dánjal og Reykjavíkar Queer Choir at hoyra á palli.

Konsertin byrjar klokkan 16.45 og heldur fram til áleið klokkan 19.30.

Tey bæði skriva á Facebook, at tey fara síðst á pallin. Tað vil siga umleið klokkan 19.00. Konsertin er økeypis og partur av Gay Pride tiltakinum hjá LGBT Føroyar.

Í MORGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og regn av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið

SUNNUDAGIN



Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og ælingur, men onkur sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.


MÁNADAGIN




Lot til andøvsgul av útnyrðingi og fyrrapartin okkurt ælið. Men annars turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið týsdagin og mikudagin:
Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi og sirm ella mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 14 stig.

LUFTTRÝSTIÐ




Síðstu nátt:
Eitt lágtrýst, 1005 hPa. í útsynning úr Føroyum fer eystureftir.




Komandi nátt:
Lágtrýstið í landsynning úr Føroyum stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður við Føroyar alla Ólavsøkuna.

HITALAG



Normal 1961-1990: 10,3°C

AVFALL



Miðal 1961-1990: 70 mm

VESTFALLSKYRRINDI

26/7: Fyrra kvarter
29/7: Mánin næstur jørðini
2/8: Fullm
10/8: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2012

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
27. juli	01:37	14:33	00:37	13:33	00:52	13:48	03:37	16:33	04:37	17:33	-	12:48	11:48	-	01:52	14:48	02:52	15:48	01:22	14:18	02:37	15:33
28. juli	02:57	15:24	01:57	14:24	02:12	14:39	04:57	17:24	05:57	18:24	01:12	13:39	00:12	12:39	03:12	15:39	04:12	16:39	02:42	15:09	03:57	16:24
29. juli	03:51	16:18	02:51	15:18	03:06	15:33	05:51	18:18	06:51	19:18	02:06	14:33	01:06	13:33	04:06	16:33	05:06	17:33	03:36	16:03	04:51	17:18
30. juli	04:46	17:14	03:46	16:14	04:01	16:29	06:46	19:14	07:46	20:14	03:01	15:29	02:01	14:29	05:01	17:29	06:01	18:29	04:31	16:59	05:46	18:14
31. juli	05:43	18:10	04:43	17:10	04:58	17:25	07:43	20:10	08:43	21:10	03:58	16:25	02:58	15:25	05:58	18:25	06:58	19:25	05:28	17:55	06:43	19:10